gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Landstýrið skyldar borgarunum eina frágreiðing

Varaløgmaður vísir áhaldandi á búskaparpartin av Hvítubók, tá hann verður spurdur um búskaparligu avleiðingarnar av ætlan Landstýrisins.

Fyrst er at siga, at búskaparfrøðingarnir, ið skrivaðu Hvítubók neyvan hava verið samdir um allar avleiðingarnar. Helst er hetta tí, at ein samlað niðurstøða brillierar við sínari fráveru í Búskaparpartinum av Hvítubók. Eisini er pástandurin um at sleppa frá einum beinleiðis niðurskurði í tí almenna heilt burturvið. Við teimum íløgum, ið liggja fyri framman í tunnlum, skipum, skúlaverki, heilsuverki, útoyggjagrunni o.s.fr. er talan um tað øvugta av einum niðurskurði. Kanska ætlar Landsstýrið at fortelja suðringum, at teir einki skip fáa, norðingum at eingin undirsjóvartunnil verður og Føroya Lærarafelag, at føroysku skúlarnir ikki koma at uppfylla krøvini í nýggju fólkaskúlalógini í tey næstu 20 árini.

Vit hava í blaðnum í gjár sæð eina búskaparliga útrokning av avleiðingunum av ætlan landsstýrisins. Henda útrokning varð gjørd av einum av fremstu búskaparfrøðingunum í Føroyum. Hvar eru tølini hjá Landsstýrinum? Ongantíð hevur man tikið eina so stóra búskaparliga avgerð á so spinklum grundarlag. Landsstýrið skyldar føroyska borgaranum eina frágreiðing - og einki hjálpir at peika á Hvítubók, tí rættiliga optimistiska fortreytin um "ikki ein beinleiðis niðurskuð" er ikki í samsvar við veruleikan í dag, har stórar íløgur standa fyri durum.

Tað tykist sum um at fullveldisfortalararnir í samgonguni ganga og rópa alt ov nógv upp um søguligar avgerðir, søguligir dagar, søguligar tíðir o.s.fr. Eisini hava fullveldisfortalararnir tann keðiliga óvana at fortelja nútíðini hvussu mótstøðumenn fara at vera sæddir í søguligum ljósi, og onkur fer enntá so langt sum at vurdera, um politiskir mótstøðumenn duga til sítt borgarliga starv. Um allar hesar kreftir, ið nú verða brúktar til at royna at skriva seg og sínar mótstøðumenn inn í søgubøkurnar við øvugtum fortekni høvdu verið brúktar til at útrættað veruligt arbeiði, so kundi ein búskaparlig útrokning verið gjørd uppá eitt tvey trý. Hon hevði ikki verið pen, men borgarin kann ikki taka støðu uttan.

Søguskriving um dagin í dag orna okkara eftirkomarar, so tann óbeskedna sið at seta søgulig pluss og minus á fólk eiga fullveldismenn at niðurleggja og heldur hugsa um fíggjarlógina tey næstu 20 árini. Vit sóu eitt gott boð uppá hana í gjár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Lágt ríðir hann, Eidesgaard

**Heri Eysturlíð**
*Stockholm, Flaggdagin 2001*



**Eitt er at argumentini eru uppi, eitt annað er at rópa til himmals av armóð**

Í farnu viku fekk Johan "Hot" Mortensen av at vita frá einum av teim sosialdemokratisku stivlaknektunum, tí at hann hevði loyvt sær at víst á nakrar av teim gomlu mentannarmonnunum í Føroya Javnaðarflokki, borið teir saman við teir núverandi javnaðarpolitikararnar og skírt onkran teirra hálvbarbar.

Grovur og groteskur pástandur? Jú, sanniliga. Men tað mest tragiska av øllum hesum er ikki pástandurin í sær sjálvum - sum í grundini ikki er ein pástandur, men ein staðfesting. Tíverri hevði Johan Mortensen 100 % rætt. Tað prógvaði sjálvur javnaðarhøvdingin so væl og virðiliga, tá ið hann í eini kjaksending í Sjónvarpi Føroya herfyri samanbar semjuna í samgonguni tann 9. Mars við ta tiltiknu Krystallnáttina.

Henda sjúkliga samanbering sigur ikki serliga nógv um samgonguna, men hon sigur tess meir um Jóannes Eidesgaard. Hetta er eitt studii í sálarfrøði. Úttalilsið er fullkomiliga burtur úr vón og viti og sigur ikki bara nakað um muruna í manninum, men eisini um hansara politisku, søguligu og almennu vitan, um hansara dømikraft, uppdragilsi og um hvørjum moralskum, etiskum og mentunnarligum støði hann er á.

Hetta vitleysa úttalilsið sigur ikki lítið um Eidesgaardsa politiska format, um andstendigheit og fólkaskikk. Hetta er eitt skelkandi dømi um politiskt dugnaloysi og armóð, og við hesum fer Jóannes Eidesgaard helst í søguna sum tann føroyski politikari, ið gav retoriskari ómegd eitt andlit.

Og hetta samstundis sum javnaðarfólk øsa seg almikið um hatur hjá øðrum! Skulu vit flenna ella gráta?

**Søguloysi ella býttiskapur**

Væl kann tað politiska kjakið í Føroyum mangan liggja á heilt ófatiliga lágum støði, og við hetta lag munnu flestu føroyingar hava fingið harða húð í so máta. Men skræðugákar og tómar tunnur valdast, og hesaferð mátti eg kortini ringja heim at fáa hesi ódámligu tíðindir váttaði ella avsannaði. Tí mangar eru slatrisøgurnar, og eg hugsaði at so groteskt primitivur og óciviliseraður kann væl eingin politikari vera! Ikki ein fólkatingsmaður, eitt løgmansevni? Ein feril av andstendigheit er væl onkunstaðni?

Men tíverri. Syrgiliga bóru tey boðini fram…

Nú ber Jóannes Eidesgaard ikki júst orð fyri at vera nakað politiskt reystmenni, og eingi uttan tey heilt ortodoxu javnaðarfólkini munnu vænta sær retoriskar perlur av hansara munni. Men álvaratos! Hvat ríðir manninum, og hvat hugsar hann fyri sær? Er eingin sum helst skomm skapt í honum? Eitt er at vera politiskt ósamdur, eitt annað er at bera seg at sum ein politiskur barbarur.

Tað man vera øðrum enn mær ein gáta, hvat ið fær ein floksformann og fólkatingsmann anno 2001 at siga nakað so vamlisligt sum hatta fyri opnari mikrofon. Undirlutakenslurnar mugu vera øgiligar. Er hetta tekin um býttiskap, fullkomiligt søguloysi, analfabetismu, ella er okkurt annað galið?

Ja, tíverri má eg vera so frekur at spyrja, um maðurin er idiot! At kalla hann óuppdrignan hevði verið at skammróst honum.

Væl er tað gomul sosialdemokratisk siðvenja, og ikki bara í Føroyum, at skíra øðrvísi hugsandi fyri fascistar og mangt slíkt. Men av øllum primitivum, svínskum orðaskvaldri bera hasi seinastu úttalilsini hjá Eidesgaard prísin. Javnaðarhøvdingin fær sjálvt Dagblaðið at minna um Mína Jólabók, og hann setir kjaftaslitið av teim sosialdemokratisku undirhundunum í eitt heilt nýtt ljós. Við slíkari fyrimynd er lítið annað at vænta.

**Sópa fyri egnum durum**

So kunnu vit altíð illgita, hvørt Jóannes Eidesgaard sigur hatta burtur úr egnum brósti, ella um hann hevur sufflør. Hasin ófantaligi málburðurin er okkum ikki heilt ókendur. Men politiskur sprellimaður ella ikki, so er ilt at skilja hvussu eitt slíkt vittíggi kann umboða so stóran part av Føroya fólki og haraftrat sita í Fólkatinginum. At eitt slíkt skal bjóða seg fram til løgmann, er heldur ikki serliga hugaligt.

Ikki er minni óhugnaligt, at sovorðin søguloysingur eisini er professionellur barnauppalari. Hvussu í víðu verð kann slíkur maður læra tað uppvaksandi ættarliðið munin ímillum rætt og skeivt, moral og etikk, mentan og hvørt av sínum? Hetta mátti fingið mong foreldur á Tvøroyri at ligið í andvekri.

Summir javnaðarpolitikarar eru so óførir at vísa øðrum á orðabøkur. Alt gott um tað, men hví ikki sópa fyri egnum durum og læra sín egna floksformann tað mest elementera úr heimssøguni? Ella givið honum grundskeið í vanligum fólkaskikki?

Í tí sambandi kundi formaðurin eisini tikið í oyruni á teim gomlu moskvakommunistunum í flokkinum og tráspurt teir, hvørja støðu teir nú hava til demokrati og parlamentarismu. Okkurt bendir á, at formaðurin sjálvur blandar nøkur ting saman, og kanska hevur onkur av teim kommunistisku undirhundunum lýtt honum orðini um Krystallnáttina í oyrað, hvør veit? Hatta ljóðar jú sum klassiskur kommunistaretorikkur og kann geva føroyingum eina hóming av hvat teir hava at vænta sær, skuldi Edesgaard og hansara skutilsveinar komið til ræðið.

**Etikkurin í SvF?**

Kenni Øssur Winthereig eitt sindur frá okkara arbeiði við Føringinum á sinni, og hann virkaði fyri mær sum ein seriøsur journalistur, ið gekk høgt upp í fjølmiðlaetikk. Eitt nú dámdi honum als ikki ta serføroysku siðvenjuna at misbrúka bløðini til "ruskspann", runublak og persónsútspillingar. Men hvørja støðu hevur hann til etikkin í Sjónvarpi Føroya? Tiltikið er at stagnera fakliga tá ið tú flytir aftur til Føroyar, og antin er Øssur Winthereig steinsovnaður, hevur givið skarvin fullkomiliga yvir, ella eisini hevur Jóannes Eidesgaard fingið okkurt slag av framíhjárætti og undantaksloyvi í SvF.

Í einum Sosiali í fjør gramdi javnaðarformaðurin

*Framhald á síðu 13*

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Hvat er ein føroyingur?

**Dánial Jákup Jakobsen**
*Skálavík*

Hvat sær ein føroyingur tá ið hann sær seg sjálvan í speglið, sær hann ein føroying í sær sjálvum, ella er tað ein innbilningur um at kanska eri eg ein føroyingur sum hann kanska, ella fult út slær seg til táls við. Men eitt er ein innbilningur eitt annað er veruleikin sum bert er eins og ein hvørvisjón man trýr man sær, ella billar sær sjálvum tað inn og trýr uppá tað við góðari hjálp frá tí umhvørvi man livur í. Líkasum tað, ella um at vit í Føroyum eru ein tjóð og eitt fólk, við fullum sjálvsavgerðarrætti bæði so og so í Føroyum. Hetta er tann taktikkur sum sambandslokkarnir í Føroyum brúka »Vit eru ein tjóð, vit eru eitt fólk við einum avgerðarrætti«, men hvar, bert í Føroyum? og hvat við ognarrættinum yvir landinum, so sum jørð, undirgrund og luftrúm, nei tonk ikki for nógv, tí so kundi hent at sannleikin kom fram. Og sannleikin hjá dønum er hvat danska Grundlógin sigur, hon sigur at Føroyar eru »Danskt land, donsk ogn«. Tað bleiv avprøva tá ið Landsstýrið vildi fara til NATO og ST, Danmark segði nei, tað bleiv samanborið við eins og Bornholm ella ein onnur Amt í Danmark fór til NATO ella ST. Danmark vildi heldur ikki góðtaka føroyingar sum eitt fólk undir samráðingunum um fullveldi, grundgevingin, Grundlógin segði nei. Er ikki í hesum sambandi Heimastýrið blivin ein innbilningur um at vit í Føroyum eru eitt sjálvráðandi fólk við fullum rætti til landið, sum er blivin ein Sambands-Javnaðars alkoholrúsur sum nógv í Føroyum óbevíst drekka av, óbevíst p.g.a. rúsblokkinum frá dønum, óbevíst óttan fyri at blíva rúsblokkin fyri uttan.

Danmarks rige er et rige, § 1 í donsku Grundlógini, og heimastýrislógin liggur sjálvsagt undir Grundlógini, alt annað vildi verið brot á donsku Grundlógina?

Hvat er so ein føroyingur, »Ein føroyingur er ein danskur ríkisborgari, sum hoyrir heima í Føroyum. Men í somu løtu vit flyta úr Føroyum gerast vit vanligir danskir ríkisborgarir, uttan serrættindi sum fólk«.

**Respekt puh**

Í 1946 vaknaðu føroyingar upp eftir at hava verið burtur frá Darnmark í krígsárunum. »Tóku støðu« meldaðu seg út úr ríkinum, danir søgdu »Bø«, politikkarnir rýmdu til hús, men ikki Jákup í Jákupsstovu. Høvdu vit í Føroyum bert ein veruligan politikkara á lívi tá, sum vildi frælsið?

Nú í 2001 skuldu vit í Føroyum aftur til at taka støðu, og stemma um eina vegleiðandi skipan um yvirtøku av málsøkjum sum skuldi enda við fullveldi í ár 2012, ella einum samríki á líka føti fyri báðar partar, Føroyar og Danmark, um føroyingar heldur vildu tað, men ikki sum nú, kanska vit eru, kanska vit ikki eru ein tjóð. Men so skuldi ikki ganga við fólkaatkvøðunum í ár og í 2012, danir søgdu »Bø«, Fólkaflokkurin skramblaði saman, men neyvan veljarin hjá hesum flokki sum man hoyrir um í krókinum. Men Tjóðveldisflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin hildu høvdið kalt, »Bø« er fyri politiskar flipparar.

Nú manglar meirilutin fyri fólkaatkvøðunum í ár og í 2012, so aðrir vegir mugu roynast so sum at yvirtaka alt frá dønum og betala sjálvir, so onki verður eftir av rúsblokkinum hjá sambandsflokkunum. Men eitt má sigast, nú eru ikki bert ein politikkari fyri frælsi sum tað var í 1946, eftir at danir høvdu sagt »Bø«, nú eru umleið 10, so framgongd er tann rætta vegin.

Mítt fólk er eitt ravnaslag, segði yrkjarin. Líkasum á døgum Nólsoyar Pálls og Jóanes Patursson rænir og sundurskræðir hesin afturhalds ravnur (sambandsflokkarnir) ein og hvønn tanka um nýskipan (um frælsið til Føroyar og tess fólk), ja enn tann dag í dag. Tá hann situr í búri (andstøðu) sær hann so fittur út, gorrar so mjúkt. Men tá hann verður leyslatin (í landsstýrið), tá veiðir hann har sum hann kann fáa mest burturúr, helst hjá øðrum (dønum), etur alt hann fær inná bein (blokkin), einki hann sparir til ringar tíðir, tá veiðir hann bert meir hjá øðrum (dønum).

# Sjúklingahotellið Tórshavn 25 ár

TÍÐINDASKRIV



**Góðskustøði skal vera høgt**

Tí roynir leiðslan á Sjúklingahotellinum Tórshavn áhaldandi at menna virksemið á hotellinum, og nógvar broytingar eru farnar fram, síðani føroyska sjúklingahotellið á Keypmannahavn lat upp fyri 25 árum síðani. Í fjør flutti hotellið í nýggj høli, sjúklingavegleiðing varð stovnað, og fleiri spennandi ætlanir eru í eygsjón.

Í dag fara sjúklingar, avvarðandi og starvsfólk á Sjúklingahotellinum Tórshavn at hátíðarhalda 25 ára føðingardagin hjá hotellinum, sum læt upp í Keypmannahavn 1. mai 1976.

Hotellið sum hesi 25 árini hevur veitt mongum føroyskum sjúklingum og teirra avvarðandi innivist, meðan teir hava verið til viðgerðar á Ríkissjúkrahúsinum ella øðrum sjúkrahúsum í høvuðsstaðarumráðnum, flutti 22. januar á fjør í nýggj høli í Tásingegade 29 á Østerbro. Tað hevði við sær stórar broytingar bæði fyri starvsfólk og hotellgestir.

Talið av seingjarplássum hækkaði úr 40 upp í 70, og ofta er fullsett. Á nýggja hotellinum er eisini baðiverilsi á hvørjum kamari. Brekað, sum búgva á hotellinum hava sítt egna rúm, og børnini hava tvær barnastovur at búleikast í.

– Umstøðunar eru sostatt nógv broyttar, og fyri at hava eitt høgt góðskustøði royna vit áhaldandi at menna virksemið á hotellinum, sigur Ina Charlotta Frisdahl, leiðari á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Hon vísir eitt nú á sjúklingavegleiðingina, sum er stovnað, síðani hotellið flutti í nýggj høli, og upplýsir at framtíðarætlanirnar eru nógvar og spennandi.

**Tørvur á sjúklingavegleiðing**

Endamálið við sjúkligavegleiðingini er at geva føroyskum sjúklingum eina so tryggja tilveru, sum til ber, meðan teir liggja á sjúkrahúsum í Keypmannahavn og har um vegir. Elionora Olsen, sjúkrasystir, sum hevur starvast á føroyska sjúklingahotellinum síðani 1. januar 1986 er sjúklingavegleiðari.

– Tørvur hevur verið á slíkari vegleiðing. Vit fara nú saman við sjúklingum til samrøður á sjúkrahúsinum, og tað ger sjúklingin tryggari. Tað er ikki tí, at sjúklingarnir ikki skilja donsku læknarnar, men tí tað mangan kann vera torført at savna tankarnar, tá ein er í sjúkustøðu, sigur Elionora Olsen.

Eitt annað endamál hjá sjúklingavegleiðingin er áhaldandi at menna samstarvið millum Føroyar og Danmark á sjúklingaøkinum. Harumframt átekur vegleiðingin sær eisini at hjálpa teimum avvarðandi við flutningi og øðrum, tá føroyingar doyggja á donsku sjúkrahúsunum.

Sjúklingar kunnu eisini leita sær ráð á sosialum og búskaparligum spurningum hjá sosialráðgevarunum á Ráðgevingini fyri Føroyingar í Danmark, sum hava skrivstovutíð á hotellinum.

**Ynskja sær sjúklingabuss**

Sjúklingahotellið Tórshavn hevur samstarv við aðrar partar av føroyska umhvørvinum í Keypmannahavn, og ætlanin er, at tað samstarvið skal økjast.

Føroyski presturin í Samuelskirkjuni, Bergur Jacobsen, og leiðarin í Kristnastovu, Øssur Berghamar, skiftast at hava eina andakt á sjúklingahotellinum annaðhvørt týskvøld. Einaferð um mánan verður spælt bingo. Og frá 1. juli fáa gestirnir høvi at hoyra Útvarp Føroya og Rás 2 umvegis internetið allan dagin.

Ætlanir eru at skipa fyri fleiri tiltøkum bæði á hotellinum og uttan fyri hotellið. Talan er um at skipa fyri útferðum í Keypmannahavn og øðrum tiltøkum í samstarv við Reyða Kors, og harafturat ætlar leiðslan saman við øðrum at bera so í bandi, at tað verður lættari hjá sjúklingunum at fara til tiltøk í Føroyahúsinum og hjá nógvu føroysku feløgunum á Keypmannahavnarleiðini eins og til møtir í Kristnastovu og til gudstænastur í Samuelskirkjuni.

– Til at røkka hesum málinum tørvar okkum ein sjúklingabuss, og hann hava vit ikki ráð til beint nú. Men hvør veit, kanska onkur fittur jólamaður fer at hjálpa okkum við bussinum, heldur Ina Charlotta Frisdahl skemtandi fyri.

Hon leggur stóran dent á, at sjúklingar fáa høvi at gloyma sjúkuna. Summir teirra búgva á hotellinum tveir dagar, aðrir búgva har í nakrar vikur, meðan uppaftur aðrir noyðast at búgva á hotellinum í tvey ár.

**Bóklingur um hotellið**

Leiðslan á Sjúklingahotellinum Tórshavn er farin í holt við at gera ein bókling, sum lýsir gongdina á hotellinum, frá tí tað lat upp 1. mai 1976 og fram til dagin í dag í nýggjum hølum í Tåsingegade.

Karolina Petersen av Toftum tók stig til at stovna Hotel Tórshavn, sum tað nevndist, til tað broytti navn til Sjúklingahotellið Tórshavn, tá hotellið flutti í nýggj høli í fjør. Fyrsta fyristøðukvinnan á hotellinum var Hjørdis Høgnesen, og hon lat hotellið upp í hølunum í Gothersgade 1. mai 1976. Hjørdis Høgnesen hevði leiðsluna um hendi, til Jonny Joensen tók við sum fyristøðukvinna eitt hálvt ár seinni. Jonny og maðurin, Andrias Joensen, róku síðani hotellið til tað flutti til Østerbro.

Tey bæði búðu á hotellinum og vóru sostatt til taks alt samdøgrið. Men tá hotellið flutti í nýggj høli hækkaði talið av sjúkrasystrum úr trimun upp í sjey, og nú er ein sjúkrasystir á vakt alt samdøgrið.

Føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn var upprunaliga ein sjálvognarstovnur, men í 1986 fór tað undir sjúkrahúsverkið, og í dag er tað ein serstakur stovnur undir Almanna- og Heilsumálastýrinum.